# Sníkti seg 30 ferðir inn til fólk at stjala

**Ein ungur drongur keddi seg so illa, at hann hevði tað mest sum til frítíðarítriv at sníkja seg inn til eina ávísa familju um náttina at stjala. Men til endans feldi eitt vakmyndatól hann**

HÚSFRIÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var ein øgiliga foyur og skammfullur ungur drongur, sum troppaði upp í Føroya Rætti nú ein dagin at standa til svars fyri sínar gerðir.

Men tað var eisini eitt heilt óvanligt mál, sum varð útpenslað fyri dómaranum.

Drongurin er ákærdur fyri tjóvarí og fyri at hava brotið húsfriðin hjá eini ávísari familju.

Og tað var ikki hissini, hann hevði brotið stolið og brotið húsfriðin.

Maðurin var ákærdur fyri at hava verið inni hjá somu familju einar fýra fimm ferðir mitt um náttina og stolið, ímeðan alt húsfólkið lá og svav.

Harafturat er hann ákærdur fyri at hava roynt at sleppa sær inn í hesi somu hús minst 30 ferðir á náttartíð.

Tvær ferðir hevur hann stolið eina farteldu, men annars var úrslitið smáligt, ein taska við ítróttarklæðum og ymsum til persónliga røkt og okkurt annað smáttarí.

### Pissaði á kontaktina

At enda var tað eitt vakmyndatól, sum feldi tjóvin.

Í eini roynd at finna útav, hvør tað var, sum gekk inn til tey á náttartíð, høvdu fólkini í húsunum fingið sær vakmyndatól og tey fingu sær eisini sjálvvirkandi ljós í gongina sum tendraði av sær sjálvum, tá ið onkur kom inn í gongina.

Og tað var júst tað, sum hendi seinastu ferðina, drongurin kom óboðin á gátt á náttartíð. Ljósið tendraði og hann varð fangaður á eini mynd.

Men tá ið ljósið tendraði, royndi hann, hvat hann kundi fyri at fáa tað at slókna.

Hann hevði ongi amboð við sær, men hann var kortini ikki ráðaleysur, tí hann gjørdi ikki mætari enn at pissa á kontaktina. Og tað riggaði, tí ljósið slóknaði, men tá varð ov seint.

Drongurin segði, at hann kendi tey, sum búðu í húsunum, tí talan var um ein gamlan floksfelaga. Men tað var bara einaferð, at floksfelagin var vaknaður, tá ið óbodni gesturin var komin á gátt á náttartíð.

### Keddi seg

Allir partar vóru samdir um, at slík framferð var alt annað enn vanlig

Men drongurin visti ikki at siga, hví hann hevði borið seg soleiðis at. Einasta forkláring, hann kundi koma í tankar um, var, at hann hevði kedd seg so óluksáliga illa, at hann fann upp á hvat sum helst, fyri at fáa okkurt at henda.

- Ella var tað av berari býttheit, helt hann fyri.

Drongurin er ongantíð revsaður fyrr og hann hevur eisini verið ein mynsturborgari síðani hetta her.

Hann hevur nú fast arbeiði, sum hann trívist væl í og sum hann passar væl.

Alt hetta førdi til, at hann sleppur undan at sita.

Hann fekk sostatt 30 dagar treytaða fongulsrevsing. Tað merkir, at hann sleppur undan at sita, ger hann onki annað revsivert hesi bæði næstu árini.

Hann skal tó vera undir eftirliti frá kriminalforsorgini og geva seg undir treytir frá stovninum og tað játtaði hann at gera.



*- Yvir 30 ferðir var ein ungur maður óboðin farnvið hjá somu famulju mitt um náttina ímeðan tey øll lógu og svóvu. Hann hevði onga forkláring upp á hesa heilt óvanliga atburðin uttan tað, at hann keddi seg so syndarliga illa at hann mátti finna upp á okkurt spennandi*

## Stórur tørvur er á samdøgurstilboði á familjudeildini

4 av teimum 7 starvsfólkunum á familjudeildini á Føroya Barnaheimi verða nú uppsøgd.

Hetta er orsakað av tí umlegging, sum almannastovan nú ætlar at gera. Stjórin á Almannastovuni hevur ført fram, at ongin tørvur er á einum samdøgurstilboði. Men so er ikki!

Vit hava í hesum sambandi nýtt høvið til at kanna eftir, um ella hvussu stórur tørvur er á eini samdøgurs familjudeild í Føroyum. Eftir at hava verið í samband við fleiri barnarverndartænastur og heilsufrøðingar kring alt landið, er niðurstøðan greið: Stórur tørvur er á familjudeildini! Í løtuni eru familjur á veg av landinum, tí pláss ikki er á familjudeildini. Kann væl verða, at familjudeildin ikki altíð hevur verið fullsett, men soleiðis er støðan ikki í dag.

**Servitanin hvørvur**
Familjudeildin á Føroya Barnaheimi sá dagsins ljós í 2002. Tað varð mett, at tørvur var á eini familjudeild, sum kundi vera um familjurnar alt samdøgrið. Nógv orka var nýtt at byggja eina servitan upp – og tí var hetta eitt stórt frambrot innan familjuviðgerð í Føroyum. Familjur hava áður havt eitt dagtilboð, men hetta var ikki nøktandi, og tískil varð Familjudeildin á Føroya Barnaheimi sett á stovn.

Starvsfólkini á Familjudeildini hava eina stóra servitan innan økið og hava bygt upp eina kompetansu skræddara seymaða til føroyska samfelagið. Stórur partur av hesum fer nú fyri skeytið! Eitt stórt afturstig fyri tær familjur, ið hava brúk fyri sertilboðum í Føroyum.

**Óvirðulig tilgongd**
Undiritaðu fakfeløg eru rættiliga skelkað av handfaringini av hesari tilgongd. Vit hava áður ført fram, at starvsfólkini á familjudeildini hava fingið eitt tilboð um at fáa annað starv í Almannastovuni, men her er so onki ítøkiligt tilboð komið frá Almannastovuni. Starvsfólkini hava eisini víst á ymiskar loysnir, men hesar hava allar verið kveistraðar til viks. Starvsfólkini hava verið undir stórum trýsti seinastu tíðina.

Fakfeløgini høvdu ein fund við landsstýriskvinnuna í almannamálum, Rósu Samuelsen, mánadagin, har greitt varð frá okkara sjónarmiðjum. Men hesin fundurin broytti onki. Feløgini ynsktu, at freistin var útsett, soleiðis at øll viðurskiftini kundu verða viðgjørd á ein virðiligan hátt. Men heldur ikki hetta uppskotið varð eftirlíkað.

Síðsta orðið í hesum máli er ikki sagt. Her eru so nógvir skeivleikar farnir fram, og vit undra okkum stórliga á hendan arbeiðsháttin. Tað verður veruliga "gamblað" við mannalagnum – og starvsfólk og fakfeløg verða hildin fyri tað turra spott!!

**Vinarliga**
*Starvsmannafelagið*
*Felagið Føroyskir*
*Sjúkrarøktarfrøðingar*
*Føroya pedagogfelag*